## Lóg skal verja samkynd

Í USA hava Senatið og Umboðsmannatingið samtykt eitt lógaruppskot, sum ásetir, at harðskapur ímóti samkyndum fólki er tað, sum lógin kallar "hatursbrotsverk". Sambært lógini er harðskapur ímóti samkyndum at sammeta við harðskap ímóti fólki vegna teirra húðalit, átrúnað ella tjóðskap. Undir viðgerðini hevur Eric Holden, løgmálaráðharri, upplýst, at FBI hevur skrásett umleið 80.000 hatursbrotsverk ímóti samkyndum, síðani ein samkyndur studentur bleiv myrdur í statinum Wyoming fyri ellivu árum síðani. Hann æt Matthew Shepard, og tann nýggja lógin ber navn hansara, skrivar AP.



## BBC í andgletti

Í gjárkvøldið slapp tann sera høgrasinnaði politikarin Nick Griffin fyri fyrstu ferð at taka lut í teirri væl umtóktu kjaksendingini Question Time hjá bretska kringvarpinum BBC. Griffin er formaður í British National Party, sum er kendur fyri síni sera víðgongdu sjónarmið. Fólk, sum eru ímóti flokkinum, savnaðust uttan fyri upptøkuhølið hjá BBC, meðan sendingin var, og leiðslan í BBC hevur verið fyri hvøssum atfinningum fyri, at hon loyvdi Griffin fram at mikrofonini. Í sendingini segði BNP-formaðurin, at bretskar stjórnir hava framt fólkamorð ímóti bretum við at loyva innflytarum til Bretlands.

# amtíðina



*Ætlanin er at endurskapa gamla fjøruumhvørvið á Biskopstø*

hjá borgararnum liggur fremst í huga, sigur Dávur Winther, leiðari á mentanardeildini hjá Klaksvíkar Kommunu.

- Tað er ongin loyna, at kommunan í løtuni er í einum aldudali, so ein slík ætlan má gerast í fleiri byggistigum, alt eftir, hvussu ráðini eru, sigur Dávur Winther.

Hann fegnast tó um, at tað finnast kreativar kreftir í býnum, sum hava bæði hug og hegni at geva sítt íkast til framtíðarumhvørvið í Klaksvík.

- Við slíkum kreftum og tí positiva uppbakningi ætanil hevur millum fólk, at gróðrabotnurin til at byggja eina framtíð í býnum er sera góður, sigur Dávur Winter.



*Árni Gregersen, ábyrgdarstjóri á Dimmalætting, bjóðaði vælkomin í Atlantis*

## Spennandi kjakkvøld í Klaksvík

Atlantis var meir enn fullsett, tá Dimmalætting skipaði fyri kjaki millum Gunvá við Keldu, borgarstjóra og Christian Nagata, stjóra í Nema um, hvat skal til fyri at fólk og vinnuna at trívast í Klaksvík. Hvussu skal býurin vaksa, og hvat skal til fyri at fólk skulu støðast í og flyta til Klaksvíkar.

Nógvir steinar vórður vendir Atlantis í kvøld. Skúlar, Spinnaríið, Svimjihøll, Sjómannskúlin, Kokkaskúlin, Húsarhaldsskúli, Dávavirkið, Húsið, Atlantis, Kósin, Tekniski skúli, Klaksvíkar Sjúkrahús, miðbýður og mikið afturat varð alt sett undir sjóneykuna.

Opinleiki, identitetur, missión, vísjón og innovatión vórðu sett aftur ímóti sum umráðandi hugtøk í viðføri til at savna seg um ávís øki at taka upp og branda seg uppá ella satsa uppá. Kanska leggja seg miðvíst eftir rættiliga at verða Føroya størsti og besti fiskivinnibýur ella –høvuðsstaður innan tað sama.

Samstundis er neyðugt at útvega allan tann neyðuga førleikan, sum liggur uppat einum slíkum virkisøki – bæði í fólkameingi, granskíng, skúlum og menning annars.

Sjálvandi skal ein góð ansingarskipan, skúlar og frítíðarmøguleikar vera afturat hesum. Her liggur eisini ein avbjóðing.

Jú boðini vóru mong og viðmerkingarnar nógvar og góðar frá salinum.

*Myndir: Dávur Winther*



*Gunnar Nolsøe og Archibald Black, hava gjørt teknigarnar til nýggju miðbýarætlanina í Klaksvík*



*Georg L. Petersen, blaðmaður á Dimmalætting, og Gunnvá við Keldu, borgarstjóri í Klaksvík*